# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 19. mars 2025, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Sára Jógvansdóttir, Símin Jákup Højsted, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen, Jákup S. Jóanesarson og Janus Atli Jensen.

**Skrivari:** Rúna Koba

---

Áðrenn fundin greiddi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, er eitt nýtt mál innkomið: Tekniskur leiðari. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá og viðgjørt fyri afturlatnum hurðum. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 23.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 18**
Rundkoyring í vegamótinum Hornavegur-Fjalsvegur
J.nr.: 513001-1-2025

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 10. mars 2025 mál um møguliga at gera rundkoyring í vegamótinum Hornavegur-Fjalsvegur.

Nevndin mælir til at gera rundkoyring uppá 5 m diametur í vegamótinum.

**Viðv. 18**
Tilmælið hjá teknisku nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 19**
Umsókn um stuðul – Bátastevnan 2025
J.nr.: 2000002-8-2025

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 umsókn um stuðul til Bátastevnuni 2025.

Í telduposti dagf. 11. mars 2025 sendi Áki Olsen, vegna bátastevnunevndina, umsókn um stuðul til Bátastevnuna 2025.

Bátastevnan verður í døgunum 22.-24. mai, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum fyri allar aldursbólkar. Bátastevnan er ein stevna, sum upprunaliga bleiv skipað fyri bátaeigarar til hugnaliga samveru. Tað vísir seg at fólk vilja savnast, so tiltakið umfatar nú eisini kamping, motorsúkklur, ross og so øll tey í koma við bili at vitja. Avlopið av tiltakinum er farið til bygging av kappróðrarneysti, nýggjar koppróðrarbátar og til ungdómsarbeiðið hjá felagnum. Íkastið frá Bátastevnuni ger stóran mun í felagnum og fyri felagsskapin VÍF.
Søkt varð um kr. 50.000.

Nevndin mælir til at stuðla við kr. 50.000.

**Viðv. 19**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 20**
Skráseting av oljutangum
J.nr.: 1303002-4-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 tilmæli frá teknisku nevnd um eykajáttan til skráseting av oljutangum.
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 10. mars 2025 mál um skráseting av oljutangum - tilboð frá Munin uppá skipan til skráseting. Nevndin mælir til at taka av tilboðnum, sum er uppá kr. 34.963 uttan mvg + árligt gjald uppá kr. 6.993, og heitir á fíggjarnevndina um at finna neyðuga fígging.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til eina eykajáttan í 2025 og hækkan av rakstrinum til árliga gjaldið í 2026

**Viðv. 20**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 21**
Eykajáttan til arbeiðir sum ikki blivu liðug í 2024
J.nr.: 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 mál um eykajáttan til arbeiðir sum ikki blivu liðug í 2024.

Vestmanna bygdarráð samtykti á fundi tann 30. oktobur 2024 umraðfesting av játtan við 2. viðgerð m.a. til:

| | |
|---|---|
| Asfaltera tún og høvuðsgøtu í kirkjugarðinum á Knúgvum | kr. 300.000 |
| Kloakk í Útibø | kr. 440.000 |

Omanfyri arbeiðir eru farin yvirum ár og mangla sostatt kr. 740.000 á játtanini á fíggjarætlanini fyri 2025.

Á fundinum skeyt Karl A. Olsen upp at broyta navnið á játtanini frá "Kloakk í Útibø" til "Spillvatn" og at hækka játtanina til kr. 600.000. Karl A. Olsen mælti somuleiðis til at samtykkja eykajáttanirnar á kr. 900.000.

Uppskotið hjá Karl A. Olsen varð einmælt samtykt.

**Viðv. 21**
Á fundinum greiddi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at kr. 300.000 ikki røkka til at asfaltera túnið í kirkjugarðinum á Knúgvum, tann parturin kostar kr. 100.000 afturat.

Janus Atli Jensen skeyt upp at umraðfesta kr. 100.000 frá "gongubreyt í Bøgøtu" til "túnið í kirkjugarðinum".

Uppskotið hjá Janus Atla Jensen varð einmælt samtykt.

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við broytingaruppskotinum hjá Janus Atla Jensen.

**Mál 22**
Eykajáttan til ljósketu til ymiskt prýði til bygdina
J.nr.: 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. mars 2025 mál um eykajáttan til ymiskt prýði til bygdina.

| | |
|---|---|
| Nýggj ljósketa til stevnur | kr. 100.000 |
| Jólaprýði | kr. 50.000 |

Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla til eina eykajáttan á kr. 150.000, sum omanfyri lýst.

**Viðv. 22**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

Varð viðgjørt fyri **afturlatnum hurðum**

**Mál 23**
Tekniskur leiðari
J.nr.: 8103002-2-2025

Bókin lisin.

Fundurin lokin kl 18:00

Sign.:

Sára Jógvansdóttir    Símin Jákup Højsted    Anja Haldansen    Karl A. Olsen

Pauli Magnussen    Jákup S. Jóanesarson    Janus Atli Jensen